# Ætlaðu at skapa 35 almenn arbeiðspláss í Suðuroynni

**– Hetta hevði skapt 35 nýggj, almenn arbeiðspláss í Vági og tað átti at verið kærkomið, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður. Men Vágs Býráð tók ikki undir við ætlanini**

MENNINGARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta var eitt serligt tilboð til Vágs Býráð. Tekur býráðið ikki av, verður røktarheimið heldur ikki bygt nú, tí so verður tørvurin í Suðuroy viðgjørdur íeini landsætlan, sigur Hans Pauli Strøm*

– Eg haldi, at hetta var eitt kærkomið tilboð til vágbingar. Tí kom tað óvæntað, at Vágs Býráð ikki tók av.

Eisini Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, er bilsin av at Vágs Býráð ikki tók av tilboðnum frá landsstýrinum um at flyta miðnámsskúlan til Hovs og heldur byggja røktarheim á stykkinum, sum er grivið út til miðnamsskúla.

Hann sigur, at Hetta var ein liður í royndunum hjá landsstýrinum at seta tiltøk í verk, sum kunnu menna Suðuroynna.

– Ætlanin var at leggja eitt heildaruppskot fyri Vágs Býráð, sum hevði verið eitt stórt framstig fyri Suðuroynna, og serliga fyri Vág og syðru helvt sum heild, sigur Hans Pauli Strøm.

Samstundis er hetta eitt tilboð, sum hevði loyst nakrar ítøkiligar trupulleikar.

– Annar parturin í tilmælinum var at loysa hølistrupulleikarnar hjá miðnámsskúlanum og heilsuskúlanum. Høvdu báðir skúlarnir verið fluttir til Hovs, høvdu vit sloppið undan at bygt tveir skúlar.

Men hin parturin var at seta eina tænastu á stovn í Vági, sum alstórur tørvur er á.

Hans Pauli Strøm sigur, at tilboðið til vágbingar var, at stykkið, sum er grivið út til miðnámsskúlan, skuldi heldur brúkast til eitt røktarheim.

Tað, sum er goldið fyri útgrevsturin, kundi eisini inngingið sum parturin hjá kommununi av byggingini.

### Suðuroy ringast fyri

– Suðuroyggin er ein partur í landinum, sum er eina ringast fyri til ellis- og røktarheimspláss. Ein tørvsmeting fyri nøkrum árum síðani vísti, at tørvurin er á gott 40 plássum.

Hans Pauli Strøm sigur, at serliga stórur er tørvurin á røktarheimsplássum.

Og tað var júst tilboðið til Vágs Býráð.

– Vit skutu upp at ístaðin fyri miðnámsskúla, skuldu vit byggja eitt røktarheim til 35 fólk í Vági.

Hann sigur, at trupulleikin við eldrasambýlunum er, at tey eru ikki útgjørt til at taka sær av røktartørvum.

Tí her hetta ein íløga sum tað avgjørt er brúk fyri, samstundis sum hon kundi lætt trýstið á sambýlini.

– Men eitt røktarheim krevur eisini rættiliga nógv starvsfólk. Tað krevur eitt starvsfólk fyri hvørt búfólk. Sostatt hevði talan verið um eini 35 almenn starvspláss, sum vit ætlaðu at seta á stovn í Vági.

Hans Pauli Strøm sigur, at talan er um 35 góð arbeiðspláss, sum krevja útbúgving til sjúkrarøktarfrøðingar o.s.fr. Talan er eisini um 35 arbeiðspláss, sum eru fullkomiliga óávirkað av sveiggjum í búskapinum og vánaligum fiskiskapi. Tí er hetta 35 trygg og støðug arbeiðspláss, við hampiliga góðum inntøkum.

– Og tað er fyri nógv størsta partin arbeiðspláss til konufólk, sum stórt trot er á.

Hans Pauli Strøm sigur, at fyrimunurin hjá kommununi er eisini tann, at kommunurnar partur av byggingini er lítil, tá ið tað snýr seg um røktarheim og harafturat betalir landið allan raksturin.

– Sostatt hevði tað borið til at skapt rættiliga nógv arbeiðspláss fyri eina lutfalsliga lítla íløgu.

Hann sigur, at tey 35 størvini høvdu tilsaman fingið eina løn upp á 15 milliónir um árið, sum so høvdu komið í umfar í Suðuroy, umframt inntøkurnar av skattinum.

Men vágbingar siga, at tað hevði bara ført við sær, at teir vágbingar, sum arbeiða á sjúkrahúsinum og ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri, høvdu bara flutt suður og so hevði ongin vinningur verið sum so?

– Lat so nakrar vágbingar skifta starv. Men so má onkur annar setast í starv á Tvøroyri.Og tað skerst ikki burtur, at her er talan um 35 nýggj, almenn arbeiðspláss í Vági og tað átti at verið kærkomið, sigur Hans Pauli Strøm.

Og av tí, at grundstykkið er at kalla klárt og grivið út, kundi arbeiðið farið ígongd beinanvegin, leggur hann afturat.

Men ístaðin fyri at taka av hesum tilboðnum, boðaði Vágs Býráð frá, at tað hevði onki ímóti, at landsstýrið helt fram at byggja røktarheimið á Tvøroyri út.

### Eitt serligt tilboð

Hans Pauli Strøm sigur, at hetta var eitt serligt tilboð til Vágbingar í eini roynd at skapa arbeiðspláss og menning í økinum.

Men taka vágbingar ikki av, verður nýtt røktarheim heldur ikki bygt í Suðuroy - í hvussu so er ikki enn.

– Taka vágbingar ikki av tilboðnum, dettur tilboðið burtur og so verður røktartørvurin í Suðuroy mettur í eini heild, saman við tørvinum í øllum landinum og so er ikki til at siga, hvar málið endar, sigur Hans Pauli Strøm.

# Bólturin liggur nú hjá Vágs Býráð

**Hava vágbingar ráð til at siga nei til 35-40 almenn arbeiðspláss í Vági, skilji eg onki, sigur Johan Dahl, løgtingsmaður. Hendrik Old má hava nakrar dagar at summa seg í**

MENNINGARÆTLAN
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*





*Bæði Johan Dahl og Hendrik Old eru bilsnir av støðuni hjá Vágs Býráð.Johan Dahl skilr onki og Hendrik Old má summa seg aftur*

Johan Dahl skilir onki.

Hendrik Old má hava nakrar dagar at summa seg í.

Tað er støðan eftir ein fund í Vági leygardagin ímillum landsstýrið og Vágs Býráð.

Tað vóru landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, við sjálvum løgmanni á odda, sum høvdu fund við Vágs Býráð leygardagin.

Á tí fundinum skeyt landssstýrið upp, at miðnámsskúlin, sum grivið er út fyri í Vági, verður fluttur til hovs ístaðin og bygdur sum ein partur av einum skúladepili har.

Afturfyri skal eitt røktarheim til 35 fólk byggjast, har miðnámsskúlin varð ætlaður í Vági.

Men sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, vísti Vágs Býráð ætlanini frá sær.

### Skilji onki

Johan Dahl er løgtingsmaður fyri Suðuroynna og hann er hartil limur í samgonguni og limur í politiska arbeiðsbólkinum, sum skuldi royna at vísa á tiltøk, sum kundi fáa gongd aftur á í Suðuroynni.

Hann var við fundinum í Vági sum eygleiðari. Og hann skilir ikki støðuna hjá Vágs Býráð.

– Vit hava hugsað um ymsar møguleikar at seta almenn arbeiðspláss á stovn í Suðuroy, sum krevja útbúgvingar.

– Og eitt røktarheim í Vági til 35 fólk, er eisini eitt støðugt, alment arbeiðspláss til 35-40 fólk.

Umframt starvsfólkini á sjálvum røktarheiminum, førir tað nógv avleitt virksemi við sær, eitt nú vaskarí, køk o.s.fr.

– Hava vágbingar ráð til at siga nei til 35-40 almenn arbeiðspláss, skilji eg onki, leggur hann afturat.

Tí kom tað ógvuliga óvart á løgtingsmannin, at Vágs Býráð havnaði ætlanini.

Hann vísir eisini á, at hetta eru støðug arbeiðspláss, sum eru fullkomiliga óávirkað av gongdini í fiskivinnuni ella sveiggjunum í búskapinum annnars.

Og so er tað næstan bara talan um konufólkastørv, sum tað er harðliga brúk fyri í Suðuroy.

Hann sigur, at orsøkin til, at miðnámsskúlin og røktarheim eru tengd saman er fyri at fáa politiska undirtøku fyri ætlanini, tí við at leggja bæði heilsuskúla og miðnámsskúla saman í Hovi, verður tað bíligari.

Johan Dahl sigur, at hetta var bara eitt tilboð.

– Bólturin liggur nú hjá Vágs Kommunu og so má býráðið hava málið til umhugsunnar og taka eina endaliga støðu.

Hann sigur, at annars verður arbeitt við øðrum ætlanum fyri Suðuroynna.

– Men tað er ikki í hesum málistokkinum, leggur hann afturat.

### Summa seg

Hendrik Old, sum er hin løgtingsmaðurin úr Suðuroy, sum situr í samgongu, hevur onga viðmerking í løtuni.

Hann var eisini við á fundinum sum eygleiðari. Og at kommunan havnaði tilboðnum, kom so óvart á hann, at hann má fáa nakrar dagar at summa seg í, sum hann tekur til.





*Økið, har grivið er út fyri miðnámsskúla í Vági. Ætlanir landsstýrisins um at leggja eitt røktarheim ístaðin, og flyta skúlan til Hovs,*
*svnsmynd*

# Takka nei til røktarheim fyri miðnámsskúla

**Landsstýrið var um vikuskiftið á fundi við Vágs Býráð, har tað á kunnandi fundi førdi fram eina hugsan um at byggja røktarheim á økinum, har grivið er út fyri komandi miðnámsskúla**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ein skúladepil skal so ístaðin byggjast í Hovi. Eitt røktarheim hevði ført við sær eini 35 almenn arbeiðspláss og tað er við skúlapolitiskum hugsanum og við støðuni í Suðuroyar syðru helvt í huga, at landsstýrismenn kunna um hugsanir sínar, men Vágs Býráð takkaði einmælt nei til tilboðið.

Tað er ikki á hvørjum degi, at eitt væl umboða lið úr landsstýrinum vitjar Suðuroynna, men um vikuskiftið vitjaðu 3 landsstýrismenn Vágs Býrað.

Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismenn, og løgmaður Jóannes Eidesgaard, hildu kunnandi fund við Vágs Býrað í samband við hugsanir um skúlapolitikk og vánaligu støðuna í Suðuroynni, serliga í syðru helvt, tá hugsa verður um vinnu og arbeiðsloysi.

Landsstýrið kunnaði um hugsanir sínar, sum innibera at leggja eitt røktarheim har, ið grivið annars er út fyri miðnámsskúla. Ístaðin skal so ein skúladepil gerast í Hovi, har fyrst miðnámsskúli og heilsuskúli skulu húsast, men síðani kanska annað eisini, so sum kanska handilsskúli. Sostatt skuldi heilsuskúlin á Tvøroyri eisini flutt til Hovs.

Við einum røktarheimi hugsar landsstýrið sær, at eini 35 almenn arbeiðspláss fylgja og gevur hetta eini 15. milliónur krónur í lønum og harvið vaksandi skattainntøkur.

- Talan er ikki um eitt tilboð, men um kunning um nakrar hugsanir í samband við fíggjarlóg og skúlahugsanir, eisini havandi støðuna í Suðuroyar syðru helvt í huga. Skattainntøkurnar í Vági eru fallandi, Miðnámsskúlaætlanin er koman hartil, at skal nakað endurskoðast, so skal tað vera nú og skúlapolitiskt verður víst á ein møguleika, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Í Hovi skuldi so heilsuskúli og miðnámsskúli verið í einum sjálvstøð-ugum skúladepli, har tað ikki sum nú viðvíkjandi miðnámskúlanum er talan um eina deild ev skúlanum í Hoydølum, vísir løgmaður á.

### Upp um kommunumørk

– Landsstýrið vísir á, at tørvurin fyri einum røktarheimi er til staðar og 35 stovnspláss geva eini 35 støðug arbeiðspláss av ymsum slag og talan verður eini 15 milliónur krónur í lønum, sigur løgmaður, sum leggur dent á, at talan bert hevur verið um kunnandi fund, har nakrar hugsanir hjá landsstýrinum hava verið uppi at venda, tí tá talan er um røktarheim, so er hetta nakað, sum eigur at koma frá kommununum sjálvum.

– Ein skúladepil í Hovi kann kanska bróta ísin og vísa, at vit standa saman. Og kanska er Hov partur av Vágs kommunu um nøkur ár, hvør veit? Vit mugu lyfta okkum upp um kommunumørkini, sigur Jóannes Eidesgaard, og spurdur, um hann við hesum ætlar at flyta heilsuskúlan úr valdøminum, sum hann er valdur í, so sigur hann, at tað má hann við hesum taka á seg.

### Eitt samt nei í býráðnum

Men Vágs Býrað takkaði einmælt nei til ætlanirnar hjá vitjandi landsstýrismonnunum.

– Hetta er eitt tilboð, sum gongur út yvir okkurt annað, sigur Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, og vísir á ætlanirnar við miðnámsskúlanum.

– Ongar ætlanir eru um røktarheim og tað er ein kommunal uppgáva, ið eigur at koma frá kommununum sjálvum. Harafturat hava vit stríðst fyri at fáa miðnámsskúlan. Men um landsstýrið vil byggja røktarheim, so hava vit onki ímóti tí. Tað eru teir vælkomnir til. Líkamikið hvar tað so liggur, tí tá eru vágbingar eisini við, tí kommunurnar eru felags um røktarheim, sigur Jógvan Krosslá.

– Vit eiga eitt røktarheim, sum liggur á Tvøroyri. Allar kommunurnar eiga tað í felag og hava vit verið stak væl nøgd við tað. Har starvast eisini eini 15 - 18 vágbingar, sigur Jógvan Krosslá, sum harvið eisini vísir á, at eitt møguligt røktarheim í Vági ikki so víst bert gevur størv til vágbingar.

Men missir ein ikki meira fyri minni við at siga nei? Er tað, at fáa eini 35 almenn størv til Vágs ella Suðuroyar, ikki eitt tilboð, sum er ov gott at takka nei til?

– Vit hava onki ímóti, at eitt røktarheim verður bygt og heldur ikki nakað ímóti einum skúladepli. Men hví ikki gera tað har, ið tað er frammanundan? Hesar ætlanir hava vit ikki kravt ella biðið um og vit skilja tað ikki. Og hví skal ein møguligur skúladepil treytaleyst liggja í Hovi? Hví ikki her, sum skúli nú verður bygdur? Kommunurnar eiga í felag eitt røktarheim og tað liggur á Tvøroyri og tað hevur verið fínt og vit hava tað gott við tí. Hví aftur nú fara og at flyta Miðnámsskúlan, tá hann er í Vági, og aftur fáa klandur í? Og ein depil kann eins væl vera her, sigur Jógvan Krosslá, sum altso heldur sær eindirnar lagdar har, ið tær frammanundan eru.

Hann vísir eisini á, eins og løgmaður, at tað almenna fíggjar helmingin av einum røktarheimi, meðan kommunurnar í felag fíggja hin helmingin. Raksturin er landsuppgáva.

– Hinvegin er miðnámsskúlaætlanin 100 % ein landsuppgáva, vísir Jógvan Krosslá á og hann minnir á, at óhugsandi er ikki, at eldraøkið um heilt fá ár verður lagt til kommunurnar at umsita.

### Løgmaður skilir støðuna

Spurdur um landsstýrismenn vóru vónbrotnir eftir fundin, ella um løgmaður skilir einmæltu støðutakanina hjá Vágs Býrað, sigur Jóannes Eidesgaard, at talan er bert um eitt útspæl.

– Men um býráðið metir, at landsstýrið ætlar at forkoma ætlanini um miðnámsskúla, so skilji eg støðuna, men tað er tað als ikki talan um. Men hetta er bert eitt útspæl og ein partur av nøkrum hugsanum, men ein missir altso ikki nakað við hesum, sigur Løgmaður, sum - saman við landsstýrismonnum sínum - ikki fekk sannført Vágs Býrað um framtíðarhugsanir sínar, men báðir partar fegnast um fundin, sum var sámuligur og góður, hóast staðfestast kann, at onki ítøkiligt kom burturúr fundinum.

# Stórur fyrimunir at lagt skúlan í Hovi



**Tað hevði verið stórur fyrimunur at lagt ein skúladepil í Hovi við miðnámsskúlam, heilsuskúla og kanska øðrum skúlum við, sigur landstýrismaðurin í skúlamálum**

MENNINGARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er burturvið at vit skulu vera noydd til at byggja tveir skúlar, táið ta bara er neyðugt at byggja ein.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, heldur, at tað var eitt sera gott tilboð, sum landsstýrið gav Vágs Býráði á fundi leygardagin og sum lesast kann um á síðu sjey ogí hinum greinunum her á síðuni.

Hann sigur, at grivið er út fyri nýggjum miðnámsskúla í Vági. Samstundis verður tað neyðugt at útvega heilsuskúlanum á Tvøroyri nýggj høli.

– Tað hevði verið sjálvsagt at tengt hesar báðar skúlarnar saman í ein skúladepil so at vit sleppa undan at byggja tveir skúlar, tá ið tað bara er neyðugt at byggja ein.

Hann sigur, at tað hevði ført til sparingar, bæði í bygging og í rakstri.

– Tað er tað einasta rætta, leggur hann afturat.

Men hann sigur, eisini, at skal nakað henda á hesum øki, skal tað vera nú, tí miðnámsskúlin skal bjóðast út seinni í ár.

Tað ganga einir 90 næmingar í miðnámsskúlanum. Hin skúlin er minni, men teir næmingarnir eru nokk so nógv í starvsvenjing og tí er skúlagongdin ikki so nógv.

– Tað hevði tí verið sjálvsagt at lagt báðar skúlarnar saman, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at ætlanin var avgjørt ikki at taka nakað frá vágbingum, ella suðuroyingum sum heild.

– Ætlanin var hinvegin at geva suðuroyingum nakað afturat, skoytir hann uppí.

Hvørja ávirkan hetta fer at fáa á heilsuskúlan er ilt at siga, tí har má okkurt gerast.

– Men høvdu vit havt eina loysn, ger tað arbeiðið nógv lættari og í longdini hevði tað ført stórar sparingar við sær.

– Fekst semja við Vágs Býráð um ætlanina, hevði landsstýrið farið undir ætlanina beinanvegin, sigur Jógvan á Lakjuni.

Kortini skilir hann partvís vágbingar, tí hann teir hava arbeitt nógv við skúlanum.